## Mykines fær tangabil

Sørvags kommuna hevur keypt ein anhangara við tanga og pumpu, sum ein traktorur skal draga. Soleiðis fáa fólk í Mykinesi, um stutta tíð oljuna koyrda til dyrnar, skrivaði Dimmalætting í gjár. Sørvágs kommuna hevur fingið játtaðar 200.000 krónur til verkætlanina, um at gera tað liviligari á útoyggj. Hetta eftir at Útoyggjafelagið hevur strongt á, fyri at fáa trupulleikan loystan.



## Náttúra og mentan

Mentanarnáttina verður Náttúrugripasavnið á Debesartrøð í Havn opið til kl. 22, har framsýningin av føroyska føroyskum djóra- og plantulívi, umframt føroyskari jarðfrøði, er at síggja Jarðfrøðin í Føroyum verður lýst bæði við teksti, myndum og lutum. Djóralívið er eisini væl lýst – til ber at síggja beinagrind av hvalum, skølt av avgusti og útstappaðan kóp, og kunning er um grindahval og grindadráp. Eisini sera nógv av fiskasløgunum, ið eru undir Føroyum eru at síggja har, og í urtagarðinum uttanfyri eru umleið 330 føroysk plantusløg, til vil siga at helvtin av føroysku plantusløgunum at finna har.

# Nógv virksemi er við Kósabrúnna

**Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík hevur landað fleiri skip hesa vikuna, og aftur í morgin koma skip til landingar. Nógv virksemi er á bryggjuni slíkar dagar, tá bæði línuskip, trolarar og okkurt snelluskipið kemur aftur av túri**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var nógv lív í framvið Kósabrúnni, tá vit hugdu fram við í morgun.

Fleiri skip lógu og landaðu.

Menn stóðu á dekkinum og stýrdu kassum og kørum upp úr lastini, og niðri á bryggjuni tóku aðrir ímóti, samstundis truckarnir koyrdu aftur og fram eftir bryggjuni.

Innastur við Kósabrúnna lá snellubáturin Norðsøki, og ytstur lá línubáturin Gullberg.

Ímillum hesar báðar lógu bæði línubátar og trolarar, sum fólk hjá Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík landaðu hesa løtu.

### Línubátarnir

Gullberg hevði eini 30.000 pund, Kvikk, sum lá næstur honum, hevði eini 50.000 pund, og síðan høvdu Fugltúgvan og Grani ávikavist 40.000 og 50.000 pund hvør.

Í morgin koma Jákup B og Klakkur inn at landa.

Jákup B hevur eini 50.000-60.000 pund, men tá vit frættu í morgun, vistu tey ikki rættiliga, hvussu hesin túrurin hevur vignast hjá Klakki.

Ågot landaði undan Føroyum í gjár. Teir høvdu ein hampiliga góðan túr, men besta túrin hevði Núpur, sum eisini landaði í gjár.

Núpur hevur roynt undir Íslandi, og nú teir løgdu veiðina upp í gjár, høvdu teir 142.000 pund á 12 setum.

### Trolararnir

Í dag hevur Landingarmiðstøðin í Klaksvík eisini landað tveir trolarar.

Fjalshamar og Nónhamar høvdu umleið 100 kør í part, sum er eini 120.000 pund tilsamans.

Í gjár landaði eisini ein trolari í Klaksvík. Tað var Sancy, sum hevði umleið 120.000 pund.



*Í morgun lógu bæði línuskip, trolarar og snelluskip og landaðu við Kósabrúnna í Klaksvík – og í morgin kemur eisini onkur bátur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Undan Íslandi við snellu

**Fyrsti føroyski snellubáturin í ár er komin undan Íslandi**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Snellubáturin Norðsøki, sum er heimahoyrandi á Selatrað, er komin aftur av sínum fyrsta túri undan Íslandi.

Á Kósabrúnni í Klaksvík søgdu landarar í morgun, at Norðsøki er fyrsti føroyski snellubáturin, sum higartil í ár hevur verið undir Íslandi.

### Góð veiða

Norðsøki landaði í Klaksvík í morgun, og haðani siga tey, at veiðan liggur um 70.000 pund, sum er ein rímiliga góður túrur.

Skipið hevur onkuntíð havt 90.000 pund á einum túri, men tá hava teir eisini havt fisk á dekkinum, skilst.

Meginparturin av veiðini hjá Norðsøka er upsi, men teir hava eisini eini 2.000 pund av góðum kongafiski og nakað av toski.

# Klekja rogn úr høggulokki

**Hetta er fyrstu ferð í søguni, at rogn úr mathøgguslokki eru klakt í fiskabúri uppi á landi í Føroyum**

HENDING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á forvitnisliga Sjósavninum á Argjum svimja nú nakrir ógvuliga smáir høgguslokkar, og hesir "fiskar" hava sína serstøku søgu.

Tað var ein fiskimaður, sum ringdi og boðaði frá, at hann hevði fingið nøkur undarlig rogn í gørnini, meðan teir vóru til fiskiskap á leiðunum við Føroyabanka.

Fólk, sum eru kunnug við fisk og rogn, fóru á staðið, og skjótt varð staðfest, at rognini vóru frá einum mathøgguslokki, sum hevur latínska navnið loligo forbesi, sum ikki er ókendur um okkara leiðir.

Rognini vórðu løgd í eitt fiskabúr á Sjósavninum á Argjum, og herfyri spurdist "ungi" burtur úr.

Í dag svimja soleiðis hópin av smáum høgguslokkum í fiskabúrinum á Sjósavninum á Argjum.

Mathøgguslokkurin Loligo forbesi er størri enn vanligi høgguslokkurin, sum vit nýta til agn.

Agnhøgguslokkurin ber latínska navnið Todarotes sagittatus.

Mathøgguslokkurin er kostnaðarmikil, men hevur ikki fingist í teimum nøgdum undir Føroyum, sum gera, at lønandi vinnan er komin burtur úr.

Loligo forbesi hevur serliga verið at fingið á leiðunum við Føroyabanka, men sum skilst á kønum, fæst hesin høggusokkkurin nú um fleiri leiðir á landgrunninum.

Fiskirannsóknarstovan gjørdi fyri nøkrum árum síðan royndir við mathøgguslokkinum til agns, og hesin vísti seg at royna serliga væl til tosk á Føroyabanka.

Vit fara í eini aðrari grein at venda aftur til sjáldsomu hendingina á Sjósavninum á Argjum – og til mathøgguslokkin í síni heild.



*Hetta eru høgguslokkarognini, sum nú eru klakt til smáar høgguslokkar í fiskabúrinum á Sjósavninum á Argjum*
*Mynd: Mourits M. Joensen*